# Føroyingar bora nú eftir olju

*Partur av manningini á skrivstovuni hjá Amerada Hess. Nú boringin er byrjað verða eini 11 umboð fyri oljufeløgini í samtakinum umframt 4 umboð fyri ymisk kontraktorfeløg. Boristjóri hjá Amerada Hess er Clifford Lang*



**Hósdagin »spuddaði« – setti Sovereign Explorer fyri aðru ferð í heyst borin í føroysku undirgrundina. Hesaferð fyri samtakið »Faroes Partnership« við Amerada Hess sum operatøri – fyristøðufelag – og við tí føroyska oljufelagnum Atlants Kolvetni sum ein av partnarunum**

OLJULEITING
*Jan Müller*

Hósdagin 20. september kann gerast ein týðandi dagur í føroyskari oljusøgu. Henda dagin var eitt føroyskt oljufelag fyri fyrstu ferð við til at seta borin í føroysku undirgrundina. Atlants Kolvetni, eisini kent undir heitinum Atlantic Petroleum, er – hóast bert evarska lítil partur – við í oljusamtakinum »The Faroes Partnership«, sum nú er farið undir triðju boringina á landgrunninum, eftir Statol og BP. Opera-tørfelag í hesi triðju boringini er Amerada Hess, sum nú í fleiri ár hevur havt skrivstovu í Havn og hevur fyrireikað seg til hesa fyrstu boringina. Hini útlendsku feløgini í samtakinum eru Dong og British Gas, so talan er um eitt fleirtjóða samtak við einum føroyskum, einum donskum, einum bretskum og einum amerikonskum oljufelag, ið eru við í hesi rættiliga spennandi boringini.

Ben Arabo, stjóri hjá Amerada Hess í Føroyum sigur, at alt hevur gingið sum ætlað og er hann sera fegin um, at byrjanin til hesa boringina gekk so væl. Her hugsar hann serstakliga um góða veðrið í tí mest avgerandi partinum av boringini – tá akkerini skulu fáast uppá pláss og borurin setast í.

Boripallurin Sovereign Exploerer, sum verður leigaður frá heimsins størsta borifelag, Transocean, kom tíðliga í vikuni á boristaðið Marjun skamt frá markinum. Hann var togaður frá boristaðnum hjá Statoil longur norðuri. Ikki færri enn fýra stór supplyskip, teirra millum tveir sera væl útgjørdir Mærskbátar tóku sær av ankringini av pallinum.

Boringin av Marjunbrunninum er mett at taka einar tveir mánaðir. Tvs. at vit fáa neyvan nakað at vita um úrslitið av boringini fyrr enn í einaferð í november mánað. Sosialurin skilur, at Amerada Hess skal bora góðar 4000 metrar ella nakað stytri enn Statoil. Tað er ikki møguliga at fáa upplýst, hvussu mong mál eru á veg niður eftir og hvar tey eru. Men tað skilst, at Amerada Hess hevur gjørt eitt sera neyvt og stórt forarbeiðið og at høvuðsmálið er sera vældefinerað og greitt. Talan er um ein sera stóran struktur, helst á stórum dýpi, sum kann goyma ein elefant, ið á oljumáli er eitt risastórt oljufelt.

Serfrøðingar í oljuleiting eru rættiliga bjartskygdir um boringina hjá Amerada Hess samtakinum. Hóast Statoil ikki fann olju, og tað eftir øllum at døma er nógv, sum bendir á, at BP heldur ikki hevur funnið nakað nevnivert, so eru boðini uppá eitt stórt fund í Marjunbrunninum rættiliga høg. Víst verður á, at brunnurin liggur tættari oljufeltunum í bretskum øki, hann er longri burtur frá basaltfláum og sillum í føroyskum øki, og málið, sum Amerada Hess fer eftir, er eisini av øðrum slag enn tey hjá bæði Statoil og BP.

Herfyri segði royndi norski jarðfrøðingurin Terje Hagevang við Sosialin, at eitt oljufund eigur at verða gjørt í einum av teimum trimum brunnunum, sum verða boraðir í ár. Hann metti eisini júst møguleikarnar í teiginum hjá Amerada Hess at verða góðar. Hóast oljufeløg arbeiða við ymsum leitimodellum og hava ymiskar metingar og meiningar um møgulig oljufelt, so vilja flestu jarðfrøðingar og geofysikarar, sum blaðið hevur tosað við og sum hava hollan kunnleika til føroysku undirgrundina, vera við, at besta boð uppá eitt oljufund í hesum trimum fyrstu boringunum er tað hjá Amerada Hess.

Umleið 7 føroyingar eru við Sovereign Explorer, nú hann er farin undir sína aðru boring í føroyskum øki. Flestu teirra arbeiða í galluni og við reingerð. Harumframt er eisini ein sjúkrasystur umborð. Føroysk heilsøla letur eisini allan proviantin til hesa tveir mánaðar drúgvu verkætlanina.

Nú triðja boringin á landgrunninum er farin í gongd eru tað helst mong, sum spyrja, hvussu man gangast hjá BP og Shell. Tað einasta vit vita við vissu er, at tað framvegis verður borað. Sunnudagin eru tveir mánaðir síðani, at West Navion setti borin í. Vanliga verður sagt, at »No news are good news«. Í hesum førinum er møguleiki fyri at vit fara at sanna tað øvugta, nevniliga at »No news are bad news«. Tó so – keldur vilja vera við, at tað, sum BP er komið fram á er áhugavert – góð oljuspor, sum kunnu hava stóran týdning fyri víðari leitingina í Gullhorninum og harvið vónirnar til at gera fund í hesum øki fyrr ella seinni.



*Ben Arabo,vinstrumegin, er spentur*

# ítróttur

Nr. 183 • fríggjadagur • 22. september 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

B36-HB:

## Havnin er størri enn gullið

**Tað tykist partvíst soleiðis, at slagið um høvuðsstaðin telur meira hjá leikarunum á teimum báðum havnarliðunum, enn FM-møguleikin hjá B36 ger tað**

GRANNAUPPGERÐ
*Jákup Mørk*



*Tú skalt síggja mótstøðuleikararnir í fleiri mánaðir eftir dystin, og hesa ferð kanska í hálvt ár, sigur Hallur Danielsen um orsøkina til, at ein grannauppgerð altíð er nakað serligt*

Grannauppgerð er í Havn sunnudagin, og sum vera man, er spenningurin um hesa stórur. At so annað liðið hevur møguleika at gerast meistari, ger hann ikki minni. Heldur ikki hóast risastórur munur hevur veri á, hvussu kappingarárið hjá liðunum báðum hevur hilnast higartil. Bestu dømini um, at støðan á stigatalvuni einki hevur at siga, skulu hest finnast í ávíkavist 1991 og so í fjør.

Í 1991 gekk alt upp á stás hjá B36, meðan HB hinvegin hevði eina kreppu av teimum heilt stóru. Eldra havnarliðið megnaði tó at vinna heili 8-2 í fyrra grannadystinum, meðan hin seinni endaði við javnleiki, 1-1. Tað kann leggjast afturat, at hevði B36 vunnið seinna dystin, ella »bara« tapt 7-2 í tí fyrra, hevði liðið verið meistari tað árið, men tað mátti so bíða í seks ár afturat.



*- Vit hugsa ikki so nógv um sjálvt metið, men tað at vinna tvær ferðir á HB er altíð nakað heilt serligt, og tað ætla vit so at gera, heldur Egil Zachariasen*

Í fjør gekk tað minni væl hjá B36, meðan tað gekk framúr væl hjá einum at kalla spildurnýggjum HB-liðið. Fram til næst seinasta umfarið hevði liðið allar møguleikar, men í seinasta minuttinum av grannauppgerðini móti B36 vóru tvær hendingar, sum høvdu avgerandi ávirkan. Fyrst misnýtti HB brotsspark, og løtu seinni javnaði B36 til 2-2, og oyðiliegði har við gull-møguleikan hjá HB.

### Torir betri

Nú kunnu teir reyð/svørtu so siga takk fyri seinast, og skal tosast um ein sannlíkan málskjútta hjá HB, so fellur tosið uttan iva á miðvallaran, Hall Danielsen. Tað er ikki so ofta, at Hallur er á talvuni, men seinnu árini hevur hann havt tað fyri at skora móti grannunum. Millum annað í 2-2 dystinum í fjør.

Eftir venjingina hóskvøldið fingu vit orðið á Hall, og spurdu hann, hvussu hetta bar til.

- Tað er nokk tí, at tá talan er um dyst móti B36, so er mann helst eyka nógv uppsettir. Ikki soleiðis, at eg eri meira uppsettir enn hinir, men onkursvegna havi eg fleiri ferðir skorað í júst hesum dystunum, og tí fær mann kanska dirvi til at royna seg, tá møguleikin kemur.

- At mann er so uppsettir, kemst eisini av, at tað eru grannarnir. Tú skalt síggja mótstøðuleikararnir í fleiri mánaðir eftir dystin, og hesa ferð kanska í hálvt ár, har teir kunnu rópa seg føroyameistarar, og tað kann verða tungt.

Hóast tað ikki merkir eitt endaligt farvæl til B36, so kann HB gera tilveruna hjá B36 heldur súra, um teir vinna sunnudagin, og harvið geva teimum eitt takk fyri seinast. Spurdur, um hetta hevur nakra ávirkan, sigur Hallur, at tað hevur tað avgjørt.

- Vit hugsaðu kanska nakað um hetta, undan seinasta umfari, men sum støðan er nú, so avgera vit ikki nakað beinleiðis. Tað er tó so nógv annað, sum eisini spælir inn. B36 kann taka metið hjá HB, um teir vinna dystin, teir kunnu gerast føroyameistarar og havnarmeistarar, so har er so nógv, sum spælir inn.

- Ikki tí. B36 hevur havt tað besta liðið í ár, og teir hava uppiborið at gerast meistarar, men tað skal so ikki verða móti okkum. Sum HB’ari frá barnsbeini av, hevði tað í øllum førum verið eitt sindur tungt at borið, sigur Hallur Danielsen.

Annars tykist einasta ivamálið í HB-hópinum vera Allan Mørkøre, sum ikki hevur vant hesa vikuna, og ivaleyst vóna tey í HB, at landsliðsmaðurin verður tøkur til uppgerðina.

### Gullið er eykavinningur

Tann leikarin hjá B36, sum í fjør var høvuðsmaðurin aftan fyri javnleikin móti HB, var Egil Zachariasen, sum í seinastu sekundunum ta ferðina setti bóltin í málið.

Í ár eru leikutirnir undan dystinum býttir um, men hóast teir í B36 eru vitandi um, at tað ikki merkir eitt farvæl til FM, um teir tapa fyri HB, so tykist hetta ikki vera nakað, sum sweeparin á oddaliðnum hugsar um.

- Dysturin sunnudagin hevur alt at siga. Sjálvandi kunnu vit gerast meistarar, um vit vinna, men grannauppgerðir eru nakað fyri seg. At gulið so eisini kann gerast veruleiki, ger tað bara enn meira spennandi.

Umframt FM-heitið, so vil ein sigur geva B36 metið í landskappingini við flest sigrum á rað, umframt at felagið tá vinnur sær fyrsta dupultsigurin á HB í einum kappingarári síðani 1970. Spurdur, um hetta hevur nakað at siga, heldur Egil, at tað hevur tað.

- Vit hugsa ikki so nógv um sjálvt metið, men tað at vinna tvær ferðir á HB er altíð nakað heilt serligt, og tað ætla vit so at gera.

Og minnini hjá Egil móti grannunum eru sjálvandi góð, eftir málið í fjør.

- Tað var sjálvandi eisini eitt upplivilsi, men hinvegin ætla teir heilt víst at gera tað sama í ár, og tí mugu vit so royna at steðga.

Í B36 mugu tey við vissu vera leikbannaða Pól Thorsteinsson fyri uttan. Harafturat tykist ivasamt, um tað fer at eydnast at fáa Jákup á Borg upp til dystin. Hann er í Danmark á skúla í hesum døgum, og í B36 arbeiða tey við at loysa hendan trupulleikan.

### Gloym taktikkin

At enda spurdu vit so teir báðar, hvussu teir rokna við, at dysturin sunnudagin fer at verða, og frá báðum pørtum eru boðini á leið tey somu.

Teir siga báðir, at júst í hesum dystinum, hava taktisku bindingarnar, sum venjararnir vanliga nýta, ikki nær til so stóran týdning.

Leikararnir vita, hvat tað snýr seg um. Teir fara at stríðast fyri hvørjum bólti, og sjálvt um hvørgin roknar við, at poleraða fótbóltsspælið verður sett í hásætið, so ivast hvørgin teirra í, at talan verður um ein spennandi dyst.

## Dómarin hevur kært



*Hamarin, sum í fyrstu atløgu tóktist vera sligin endaligt á Jóhannis Joensen málið, verður nú lyftir uppaftur. Dómarin í dystinum millum HB og NSÍ hevur kært málið*

**Málið um Jóhannis Joensen skal nú viðgerast av dómsnevndini. Dómarin í dystinum hevur kært málið**

MÁLSVIÐGERÐ
*Jákup Mørk*

Í vikuni hevur nakað av skriving verið um sonevnda Jóhannis Joensen málið, og hevur henda serstakliga viðgjørt, hvussu málið er handfarið av kappingarnevndini.

Í hósdagsútgávu okkara skrivaðu vit, at málið eftir øllum at døma slapp at fara aftur við borðinum í hesum umfarinum, men soleiðis verður kortini ikki.

### Prinsipp-mál

Dómarin, sum dømdi dystin millum HB og NSÍ, Niclas á Líðarenda, hevur nevnliga gjørt av at kæra málið til dómsnevndina.

Meðan vit hava skrivað um málið, hava vit roynt at fingið viðmerkingar frá dómaranum, men svarið hevur alla tíðina verið, at hann hevur umhugsað støðuna.

Nú er so líkt til, at nóg nógv er hugsað, og Niclas sigur orsøkina til kæruna vera púra greiða.

- Ikki bara fyri meg, men fyri dómarar yvirhøvur, er her talan um eitt prinsipp-mál. Eg havi ongan sum helst áhuga í at forfylgja leikaranum, men eftir at hava ráðført meg við baklandið, havi eg gjørt av at senda málið víðari. Bæði fyri at verja dómarastættina, men sum sagt mest av prinsippiellum ávum.

- Eftir mínari fatan hevur málið fingið eina fullkomuliga skeiva viðgerð, og verður hetta ikki átalað, er stórur vandi fyri, at hetta kann skapa nýggj fordømi framyvir, sigur Niclas á Líðarenda um avgerðina at kæra málið.

Nær dómsnevndin fer at viðgera málið, er ikki fastlagt.